

*Haldor plagdi at ganga úr Ánunum og niðan í Uppsalar í Klaksvík at friggja, tá hann og Ásla fyri mongum árum síðan hittust í biografsalinum í Klaksvík. Tey kunnu halda sín 56 ára brúdleypsdag til jóla*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

abbabørnum, ið hvørt er fittari enn annað. Tey síggja stórt í teimum smáu, og er tað stórt at verða uppkallaður á gamalsaldri. Tey lívgast rættiliga upp av at tosa um hvat tey plaga at spæla við børnini. Tey skiftast um at taka orðið, og er tað týðiligt, at tey trívast saman. Hóast Haldor ikki setir sær fyri at smíða longur, forðar einki fyri at hann av og á tekur harmonikuna fram. Hon hevur fast pláss á kommoduni undir familjuvegginum. Tað var eisini hon, ið førdi hann til Áslu fyri mongum árum síðan.

– Eg plagdi at spæla til dans í biografsalinum, sum var har, Atlantis er í dag. Og har fann eg Áslu, sigur hann og hyggur uppá hana.

– Tá vóru tíðirnar heilt øðrvísi enn tær eru nú. Tá fór mann í dans klokkan 22, og alt var liðugt klokkan 24, skoytir Ásla uppí.

Tá Haldor so var úti og sigldi, keypti hann henni kjólar úr Noreg, sum enn standa fastir í minninum.

– Eina ferð var eg í dans í einum so vøkrum kjóla, sum hevði so nógvar blómur á, minnist eg. Tá søgdu tey, at Haldor hevði málað tær, sigur hon og flennir.

Haldor er ættaður úr Ánunum, og hon úr Uppsulum, ið er nærhendis har tey bæði búgva í dag. Tey vórðu forlovað í 1950-51, og tá var eingin bilur.

– Tá plagdi eg at ganga úr Ánunum og niðan í Uppsalar at vitja Áslu.

## Pensjónin kundi verið hægri

Tað er friðarligt inni. Tað einasta sum hoyrist er sjónvarpið. Frensurin Tom býr saman við Áslu og Haldor, men hann er onganstaðni at síggja hendan dagin.

Tey eru komin nakað upp í árini nú, men hava ikki hug at klaga um lívið sum pensionistar. Tey klára seg sjálvi, og eru fegin um, at børn og ommu- og abbabørn leggja leiðina framvið av og á.

– Men eg haldi, at pensiónin kundi verið hægri. Vit kláraðu okkum betur, tá bara Haldor arbeiddi, enn vit gera nú. Alt er vorðið dýrari, men pensjónin er ikki hækkað. Ja, tíðirnar eru sanniliga broyttar, sigur Ásla.

Hon samanber við tíðina, tá børnini vóru smá og Haldor var nógv burturi. Tá var hann burturi í minsta lagi tíggju vikur í senn, og eingin telefon var. Tá visti mann ongantíð nær hann kundi væntast aftur. Nú sita tey og hyggja uppá hvørt annað, sum tey skemta sær við at siga, koyra biltúrar og hyggja at sjónvarpinum.